Løgtingsvalið 2011





LØGTINGSVALIÐ 2011

Helena Dam á Neystabø
landsstýriskvinna í mentamálum

Íverksetan inn um skúlagátt í fólkaskúlanum, avtala gjørd!

Nú skal íverksetaraførleikin inn um fólkaskúlans gátt. Og tí er í dag gjørd samstarvsavtala millum Mentamálaráðið og Íverksetarahúsið um íverksetan í fólkaskúlanum.

Í arbeiðinum við teimum nýggju námsætlanunum havi eg sum landsstýriskvinna í mentamálum lagt stóran dent á, at støðisførleikarnir "at samskifta", "at kanna og skapa" og "at virða" skulu mennast í øllum lærugreinum. Hetta eru førleikar, sum skulu eggja til forvitni hjá næmingunum, menna teirra skapandi evni og stimbra teirra hug og dirvi at menna síni egnu hugskot og leita sær ráð og vitan at ganga nýggjar leiðir, eins og førleikan at hugsa nýtt í víðastu merking.

Ikki nýtt fyribrigdi - men nýtt evni!

Íverksetan er ikki eitt nýtt fyribrigdi, men ein nýtt evni, sum allir næmingar skulu arbeiða við. Tann stóri spurningurin er, hvussu vit seta sjøtul á hetta arbeiði.

Íverksetarahúsið hevur í nøkur ár arbeitt við hesum og gjørt royndir, lagt fólki lag á og ikki minst næmingum í miðnámsskúlunum, sum arbeiða við ungum virki og Bussiness Game.

Vit eru fáment, og tí er umráðandi, at vit duga at samstarva og nýta førleikarnar hvør hjá øðrum. Eg fegnist tí um, at eitt skipað samstarv nú verður fingið í lag við Íverksetarahúsið, sum kann hjálpa til at veita skúlunum íblástur og fakliga vegleiðing í hesum arbeiði.

At ganga nýggjar leiðir, skapa nýtt úr gomlum, finna góð hugskot, menna tey sum vøru, tænastu ella annan áhugaverdan ágóða, eru stóru avbjóðingarnar. Og at duga og kanska serliga at tora hetta kynstur at vera stigtakari og slóðari, er ein ómetaligur góður førningur hjá børnum og ungdómi okkara at byggja á, bæði í útbúgving og arbeiði.

Vit hava skyldu til at geva teimum henda førning. Tí vit kenna ikki tær avbjóðingar ella tað samfelag, sum vit skulu menna okkara børn og ungdóm til at taka ábyrgd av um nøkur ár.

Royndarverkætlan um íverksetan

Mentamálaráðið og Íverksetarahúsið hava tí í dag gjørt av at samstarva um at skipa eina royndarverkætlan at menna íverksetaraarbeiðið í fólkaskúlanum.

Í 2011 rindar Mentamálaráðið íverksetarahúsinum kr. 200.000 í stuðli at seta í verk royndarverkætlanina og í samstarvi við skúlarnar at skipa tey í avtaluni lýstu átøk. Treytað av játtan á fíggjarlógini rindar Mentamálaráðið Íverksetarahúsinum kr. 200.000 í 2012 og 2013 til at halda fram við íverksetaraarbeiðinum í fólkaskúlanum og menna royndarverkætlanina. Stuðulin verður veittur sambært ásetingunum um m. a. fíggjarætlan, roknskap og grannskoðan í kunngerð um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

Í vikuni sum fór vóru 400 næmingar á "Innovation Camp" í Klaksvík, og har varð arbeitt av lívsins kreftum. Hetta eru næmingar sum luttaka í skúla-FM í íverksetan. Beint eftir summarfrítíðina vóru lærarar á tvey-daga íverksetaraskeiði, eisini í Klaksvík. So her grør um gangandi fót. Og tað hava vit av sonnum brúk fyri.

Eg eri ómetaliga spent at síggja úrslitini frá eftirmetingunum, tá ið FM-kappingin í íverksetan er liðug í februar næsta ár.

Góða eydnu!



LØGTINGSVALIÐ 2011

Hans Pauli Strøm
løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin

Kollveltandi bústaðarpolitiskt frambrot

Nýggi Húsalánsgrunnurin, Lutaíbúðalógin og Brúkaravernd við fastognarkeyp – hesi stórmálini vórðu øll samtykt á síðsta tingdegi. Saman kemur hetta at merkja eitt kollveltandi frambrot á føroyska bústaðarmarknaðinum.

Bústaðarmarknaður loysast úr bankafjøtrum

Tað er eitt høvuðsmál hjá Javnaðarflokkinum, at øll skulu kunna útvega sær ein hóskandi bústað fyri ein rímiliga kostnað. Trygg og góð bústaðarviðurskifti er ein fyritreyt fyri góðum livikorum og uppvakstrarmøguleikum.

Hetta er ikki møguligt hjá øllum dag. Bústaðarmarknaðurin er stirðnaður í einstáttaðum útboði av dýrum sethúsum og eigaraíbúðum – eitt útboð sum ikki svarar til tann sera ymiska tørv, sum einstaklingar og familjur hava. Hjá nógvum húsarhaldum er kostnaðurin so ovurhonds høgur, at tað kroystir teirra livikor.

Hetta er m.a. eitt úrslit av manglandi almennum bústaðarpolitikki, og at privatu peningastovnarnir onga kapping hava havt á bústaðarmarknaðinum í fleiri áratíggju.

Nýggjur virkisfúsur Húsalánsgrunnur

Við radikalu lógarbroytingini fær Húsalánsgrunnurin nú nýggjar heimildir, umframt orkulán, til at:

- Veita fígging til íbúðafeløg og íbúðastovnar til bygging av leiguíbúðum og lutaíbúðum
- Veita realkredittfígging til íbúðir og sethús
- Verða stigtakari saman við øðrum so sum kommunum, pensjónskassum, fakfeløgum, stovnum, áhugafeløgum ella privatum fyritøkum, til at
- Byggja, reka og leiga út íbúðir, íbúðarhús og lestrarbýlir

Leigu- og lutaíbúðir størsti tørvurin

Tað er neyvan í nøkrum framkomnum samfelag, at útboðið av leiguíbúðum er so vánaligt sum í Føroyum. Vánaligt merkir bæði, at útboðið er ógviliga lítið, at støðið er sera vánaligt, og at leiguprísirnir eru alt ov høgir í mun til dygdina.

- Tað eru nógv, sum ikki vilja pantseta alla sína fíggjarligu framtíð í dýr sethús ella eigaraíbúðir, men heldur vilja búgva til leigu. Í hvussu er í eina tíð.
- Tað eru lesandi og onnur ung, sum flyta heimanífrá, sum ongar bústaðarmøguleikar hava ídag.
- Tað eru stakir uppihaldarar og ungar barnafamiljur, sum ikki fáa endarnar at røkka saman við verandi húsaprísum.
- Tað eru fólk við serligum tørvi, sum longjast eftir at sleppa at búgva fyri seg sjálvan, í leigu- ella lutaíbúðum, evt. skipað sum vardir bústaðir - men ikki hava havt henda møguleika.
- Tað eru eldri, sum sita einsamøll í stórum dýrum húsum, og heldur vildu sloppið í betri hóskandi eldraíbúðir, evt sambygdar íbúðir við felags fasilitetum.

Her er størsti tørvurin fyri nýggjum fjøltáttaðum bústøðum, sum leigu- ella lutaíbúðir.

Lutaíbúðalógin veruleiki

Við nýggju lógini kunnu fólk nú taka seg saman og stovna eitt lutaíbúðafelag, til tess at útvega sær egnan bústað á ein lagaligan hátt, og uttan at seta seg í stóra persónliga skuld. Ognin verður ein felags ogn hjá lutaíbúðafelagnum, meðan einstøku lutahavararnir eiga brúksrættin til hvør sína íbúð. Felagið stendur fyri fíggingini av t.d. 80% av kostnaðinum, meðan innskotið hjá einstøku lutahavarunum kemur at verða 20%.

Um t.d. 10 lutahavarar byggja eina ogn við 10 lutaíbúðum fyri t.d. 15 mió.kr., so kemur lutafelagið at fíggja 80%, tvs. 12 mió.kr., meðan teir 10 lutaeigararnir skulu fíggja tey 20%, tvs. 3 mió, ella 300.000 kr. hvør. Hetta er tann persónliga skuldin hvør einstakur átekur sær.

Til avdráttir og rentur av lántøkuni hjá felagnum og til aðrar felags útreiðslur gjalda lutaeigararnir so eitt íbúðagjald, svarandi til eina húsaleigu. Eins og onnur bústaðarlán fáa rentustuðul og sethúsabygging fær MVG-frítøku av arbeiðsløn, verða somu treytir galdandi fyri lántøku til og bygging av lutaíbúðum.

Brúkaravernd við húsakeyp

So hava vit eisini fingið nýggja lóggávu at verja brúkaran, sum fer út á marknaðinum at gera lívsins størsta keyp – at ogna sær hús ella íbúð. Her hevur næstan valdað lóglýsi – ein elligomul keypilóg, ætlað smásølukeypi, hevur verið einasta álitið.

- Fastognarkeypilóg hevur ásetingar um støðufrágreiðing (tilsynsrapport) frá autoriseraðum byggikønum, um skaðaendurgjald fyri ábrek, um ognarskiftistrygging, um iðranarrætt við húsakeyp o.a.
- Húsameklaralóg setir krav um autoriseraðar húsameklarar, at meklari ikki kann umboða bæði seljara og keypara, at kontantprísur skal upplýsast, og at allir viðkomandi upplýsingar um ognina skulu gevast.

Standa klárir at fara ígongd

Nógvir áhugaðir partar standa klárir at fara ígongd beinanvegin, bæði við bygging av leiguíbúðum og lutaíbúðum. Verkætlanin um leiguíbúðir í sonevndu Berjabrekku 3 hevur bíðað í áravís eftir lóggávuni. Eftirlønargrunnurin LÍV stovnaði longu í febr. í fjør P/f Lutaíbúðarvirkið, við einum innskoti uppá 10 mió. kr., við tí endamáli at byggja og fíggja luta- og leiguíbúðir. Bæði í Tórshavnar og Klaksvíkar kommunum, í kommunum í Eysturoy og Suðuroy og aðrastaðni, eru ætlanir um bygging av luta- og leiguíbúðum. Samstundis er eisini áhugafeløg fyri ymiskum bólkum hjá fólki við serligum tørvi, sum í áravís hava bíðað eftir hesi lóggávuni til at fara ígongd.

Nú eru fyritreytirnar til staðar, við nýggja Húsalánsgrunninum og aðrari neyðugari lóggávu. Áhugaðir partnarar tróta ikki, tvørturímóti standa tey í bíðirøð. Spennandi verður at síggja hvussu skjótt vit fara at síggja fyrstu úrslitini av nýggja bústaðarpolitikkinum.